# Løgmaður vil framvegis hava breiða samgongu

**-men útilokar ongar flokkar og samgongumøguleikar**

*Jan Müller*

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at Fólkaflokkurin framvegis ikki vil útiloka nakran møguleika at skipa samgongu. Allar hurðar standa opnar. – Vit royna framvegis at fáa eina so breiða samgongu sum møguligt, og tað er tað, sum arbeitt verður við og hevur verið arbeitt við. Men tað er ikki nakað, sum vit einsamallir avgera. Og um eingin vil saman við okkum, so er tað ein onnur støða. Og tað er tað, sum vit vilja avklára.

Tá talan er um eina breiða samgongu, so er tað meira enn 17 tingmenn. Løgmaður viðgongur, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin draga ikki heilt eina línu í hesum máli, nú Tjóðveldisflokkurin eisini kann liva við eini smælari samgongu við bara 17 tingmonnum.

Løgmaður sigur seg vilja royna at fáa Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin aftur til samráðingarborðið. Hann heldur seg hava skyldu til at gera eina roynd aftrat, hóast tann fyrsta royndin miseydnaðist. Hann heldur tað má bera til at fáa hesar flokkar at slaka eitt sindur, soleiðis at ein breið samgonga fæst í lag. Sjálvur kennir hann seg hava leiklutin sum semingsmann í hesum samráðingum.

Men løgmaður vil við hesum avgjørt ikki útiloka aðrar samgongumøguleikar. – Um sambandið knappliga vil yvirtaka eina rúgvu av málsøkjum og ikki setur krav um innliman í danska ríkið, so er tað ikki so langt frá tí sama, sum Javnaðarflokkurin vil. Tí útiloki eg ikki nakað sum helst í verandi støðu.

## Ynskisamgongan

Hvat er so ynskisamgongan hjá løgmanni:

- Tað haldi eg gott kann siga, tí eg havi jú alment boðað frá, hvat er fór at royna í fyrstu atløgu. Og tað var ein ACDE samgonga. Eg veit væl, at tað er trupult, tá tú skal tvørtur um miðjuna í ávísum málum. Tað er onkur, sum kundi hugsað sær at sagt, at tá tað kemur til borgarligan og sosialistiskan politikk, so er tað eitt vánaligt val fyri Fólkaflokkin. Men hinvegin haldi eg, at sjálvstýrismálið hóast alt hevur fylt so mikið nógv, at tað er við útgangstøði í tí, at hatta valið varð gjørt. Eg meini, at tað átti at borið til at fingið skrúvað saman eitt kompromi. Skal man finna eina semju eru báðir partar noyddir til at flyta seg. Sær man álvaran í eyguni, hvat kann henda í tí politisku



skipanini frameftir, so eigur man at kunna finna eina loysn.

Løgmaður er annars ikki so vísur í, at tað bara er yvirtøkan av løgregluni og dómsvaldinum, sum skilur flokkarnar. Tað var tó í hvussu er tað, sum var høvuðsorsøkin til, at hann mátti staðfesta, at tað bar ikki til at finna eina loysn. Hann heldur annars, at tað eigur at bera til at gera eina semju í eini orðing um løgreglu og dómsvald. Men tá skulu flokkar geva seg eitt sindur móti hvørjum øðrum.

Vit spurdu løgmann, um Fólkaflokkurin longu hevur sagt ja til at yvirtaka løgreglu og dómsvald í tí skeiði, sum nú kemur. Til tað sigur hann, at í tí uppleggi, sum er gjørt, og sum báðir partar hava vrakað, verður lagt upp til, at man ger fyrireikingarnar, men tann politiska støðutakanin um sjálva yvirtøkuna verður tikin, tá tað arbeiðið fyriliggur.

- Merkir tað at Fólkaflokkurin ikki hevur sagt seg ganga við til, at hesi mál skulu yvirtakast í hesum valskeiðnum?

- Sjálvandi hava vit í sjálvstýrisuppskoti Føroya fólks sagt nakað um, at løgregla og dómvald skulu yvirtakast í 2006 ella so, men eg meini, at tað ber væl til at gera eina semju í eini orðing um løgreglu og dómsvald.

## Vil halda fram

- Nú er tað eingin loyna, at stevið í samgonguni millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin hevur ikki altíð verið so gott. Er tað ikki eitt tungt tak hjá tær at skula fara út aftur í Tinganes við Tjóðveldisflokkinum, tá hugsað verður um samstarvslagið?

- Tað viðgangi eg, at tað er. Men eg eri kortini tilreiðar at fara út.

- Men er tað ikki bara tí, at tú vil varðveita valdið fyri einhvønn prís?

- Tað er tað so avgjørt ikki. Men í eini slíkari samgongu krevst sera nógv av tí at fáa tingini at glíða. Eg skal heldur ikki lata vera við at siga, at tann breiða undirtøkan eg havi fingið frá fólki bæði persónliga og eisini sum uppskot til løgmanni havi eg kent sum eina ábyrgd.

Annfinnur Kallsberg sigur annars, at krav um løgmann er ikki tað primera í síni verð. Tað er fyri sær ein størri spurningur, hvat tað politiska innihaldið er.

- Merkir tað, at um tú sær, at tú fær eitt betri politiskt innihald við flokki, sum vil lata teg halda fram sum løgmann, at tú so góðtekur tað?

- Løgmansstarvið hevur ongantíð verið nøkur heilag kúgv fyri meg. Tvørturímóti. Tað er ikki nakað eg fari at halda uppá fyri einhvønn prís.

- Um nú t.d. Javnaðarflokkurin vil geva tær tað av innihaldi, sum tú heldur er gott nokk, vil tú so lata honum løgmanssessin í eini samgongu?

- Tað eru fleiri, sum avgera tað. Mín persónur er ikki nøkur forðan fyri tí. Um flokkurin meinar, at tað er fínt at gera tað, so hava teir ongar trupulleikar við mær. Tvørturímóti.

Løgmaður sigur annars, at skal man gera nakað, so eigur man ikki at lata langa tíð ganga. Skulu rokeringar gerast má tað ikki ganga ov langt út á summarið.

## Ongar realitetssamráðingar við B

- Tá tað slitnaði millum tykkum og Sambandsflokkin herfyri, var hetta tá eitt sjálvmál hjá sambandinum ikki at taka av tí møguleika, sum bráddliga stóð honum í boði?

- Tað vóru ongar realitetssamráðingar. Vit fingu nøkur ting avklárað, sjálvt um tað vendi aftur nakað seinni. Men her kemur tú aftur til tann brennandi spurningin. Hyggur tú til høgru og vinstru saman við Sambandinum skuldi tað verið nógv lættari fyri Fólkaflokkin at rikið borgarligan politikk móti einum sosialistiskum flokki, men hinvegin meti eg, at sjálvstýrismálið hóast alt hevur verið høvuðstemaið og má man nokk síggja av valúrslitinum, har teir báðir vongirnir eru størsti og næststørsti flokkur, at tað verður fokus uppá tað. Tað er eingin loyna, at vit hava ein stóran trupulleika, um tað verða Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, sum koma at hava yvirvág.

Tað er eisini ein spurningur um javnvágina at fáa gjørt eina fýra ára avtalu, sum ikki fer eftir endaliga úrslitinum. Eg síggi, at Fólkaflokkurin í hasum samanhanginum hevur sama trupulleika sum Javnaðarflokkurin hevur í eini samgongu millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin.

- Merkir tað, at sambandsfólk skulu ikki kenna seg trygg um at koma í eina samgongu?

- Mín fyrsti prioritetur er sum sagt ADCE, men um hestarnir blíva við at býta, veit eg ikki, hvat kann henda.

## Nógvir samgongumøguleikar

Løgmaður sigur annars, at tað eru nógvir møguleikar fyri samgongu. Tann eini, sum nokk er har í dag, er tann, at man hevur eitt landsstýri, sum virkar við 16 monnum, og har man hevur eitt landsstýri, sum hevur fullar heimildir, men sum teir flestu halda tað ikki er møguligt at fáa gjørt nakað arbeiði við. So er møguleikin við 17- manna samgongu. Síðani 23-manna samgongu ACDE ella ABDE oa.

Uppá fyrispurning hví løgmaður nevnir møguleikan fyri eini samgongu millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Tjóðveldisflokkin sigur hann, at tað er tí, at man hevur hoyrt nøkur rykti um BEH, og ber tað til, so ber eisini ABDE til.

Síðani hevur tú ABCD og aðrar møguleikar, um allians ikki var millum Fólkaflokk og Sjálvstýrisflokk eitt nú BCDH og BCE.

- Er tað realistiskt at rokna við, at Sambandið og Tjóðveldið kunnu arbeiða saman?

- Eg veit ikki. Men um Sambandið bráddliga vil ganga við til at yvirtaka eina rúgvu av málsøkjum og ikki setur krav um innliman í danska ríkið, so er tað ikki so langt frá tí sama, sum Javnaðarflokkurin vil.

## Varislig tilgongd

- Nú siga tjóðveldisfólk, at fullveldisgongdin kann halda fram, bara Jenis kemur uppí. Samtíðis hava vit sæð, at tað er tann meira hóvliga kósin, sum hevur sigrað í bæði Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Hvussu velur tú sjálvur tulka valúrslitið, tá tað snýr seg um ríkisrættarliga spurningin?

- Fyri mær sær valúrslitið soleiðis út, at fólk ynskja eina meira varisliga tilgongd í sjálvstýrismálinum. Tvs. ikki eina so ógvusliga, tí vit síggja, at Sambandsflokkurin er vorðin størsti flokkur orsakað av, at fólk eru bangin. Eingin ivi er um tað.

Hinvegin sær man, at Tjóðveldisflokkurin hevur ikki fingið ta ógvusligu framgongd, sum man oftani sær í veljaratølunum, og tað merkir, at vit mugu nokk síggja í eyguni, at sjálvt um hann hevur verið tann, sum hevur koyrt harðast á, so hevur hann ikki fingið tilsvarandi størri undirtøku. Valúrslitið vísir eisini, at allir flokkar hava boðað frá, at teir ynskja størri sjálvsræði, Føroya løgting skal vera evsti myndugleiki, øll mál kunnu yvirtakast osfr. Men fólk ynskja, at gongdin kann vera meira trygg, tvs. kjølfest bæði búskaparliga og umsitingarliga, og tað merkir, at ferðin skal minkast. Tað haldi eg man eigur at taka við. Vit mugu syrgja fyri, at henda prosess verður framd á tryggum grundarlag, soleiðis at breiður meiriluti

*Framhald á síðu 9*



*Framhald av síðu 8*



av fólkinum tekur undir við tilgongdini. Tað er ein orsøk til, at eg vil hava breitt parlamentariskt grundarlag, so hon fær størri fólksliga uppbakking.

Og løgmaður heldur fram: - Hyggur man at valinum, so eru væl allir flokkar meira ella minni inni fyri at yvirtaka málsøki, og harvið gera okkum meira sjálvbjargnar. Men tað er klárt, at tað er munur á flokkum, hvussu skjótt henda prosessin skal ganga. Tað er væl har munurin liggur. Hinvegin hava vit í undanfarnu samgongu sagt, at útgangsstøðið er, at vit taka fullan suverenitet av hesum landinum, meðan javnaðarmenn og sambandsmenn hava sagt, at teir ynskja eina endaliga loysn innan fyri ríkisfelagsskapin. Tvs. at har er munurin á endamálinum. Man er sostatt samdur um at fylgjast ein ávísan part av vegnum men ikki um tað endaliga. Og tí er tað neyðugt, um man far eina samgongu tvørtur um miðjuna, at man ger eina samgonguavtalu fyri fýra ár og sum ikki tekur endaliga avgerð um endan á prosessini.

Anfinn Kallsberg sigur, at í sjálvstýrissamtyktini er endamálið at ganga móti fullum suvereniteti, og skal tú hava ein annan flokk við, sum hevur eitt annað endamál, so fær tú ikki semju um endamálsorðingina, men tú kanst væl gera eina avtalu fyri fýra ár, har hesar báðar prosessirnar fylgjast.

- Men ber tað til hjá tær at halda fram við hasi prosessini við Samband-inum og Javnaðarflokkinum?

- Tað er trupult. Eg vil ærliga viðganga, at tað at tú fær eina samgongu, har tveir stórir flokkar hava eitt annað endamál enn tað vit hava havt í undanfarnu samgongu, tað er ein stórur trupulleiki. Men hinvegin dugi eg at síggja, at tað er sama slag av trupulleika fyri Javnaðarflokkin at koma uppí eina samgongu millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Og tað er tað, sum ger hetta málið so trupult.

Uppá fyrispurning um hvussu Sambandsflokurin skal fyrihalda seg um hann skal upp í eina samgonga við Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum sigur løgmaður, at hann skal førka seg rættiliga langt.

- Men hava sambandsmenn í hvussu er í teoriini ikki útmeldað, at teir eru fyri sjálvstýri eisini?

- Jú, men so er bara spurningurin hvussu langt og er tað framvegis ein máti tað verður gjørt uppá, sum ikki bindur okkum inn í ríkið. Tað er so avgjørt minstakravið. Men tað er ómetaliga trupult at finna felags gongulag fyri hasum.

## Ósemja

Løgmaður er ikki samdur við teimum, sum halda, at stór ósemja er innanhýsis í Fólkaflokkinum, nú varamenninir eru komnir á ting fyri fleiri av landsstýrismonnunum. – Nú skal eg ikki seta nakran í bás sum sjálvstýrismenn ella sambandsmenn, men tað er sera gott, at vit fáa varamenninar inn á ting, tí tá fáa vit jú breiðkað grundarlagið. Fólkaflokkurin hevur ongantíð verið einsrættaður uppá ein slíkan máta, at menn ikki hava loyvi til at hava síni sjónarmið. Eg haldi tað er útmerkað, at vit hava fingið supplerað úr 7 uppí 10 mans.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at landsstýrismenn hjá Fólkaflokkinum fara at leggja sín sess niður bara fyri at koma aftur í tingið til at forða øðrum sjónarmiðum at vinna frama. Hann vísir á, at landsstýrissessirnir hava altíð havt stóran áhuga.

# Sjálvstýrisflokkurin ger tað hann vil

**- sigur løgmaður í sambandi við tíðindini í Sosialinum og útvarpinum leygardagin um samstarv við Miðflokkin**

SAMGONGA
*Jan Müller*

Leygardagin kom fram, at Sjálvstýrisflokkurin ikki heilt útilokaði samstarv við Miðflokkin, men nývaldi tingmaðurin hjá flokkinum Kári Højgaard sá helst, at man fekk eina breiða samgongu. Tað ljóðaði eisini, at Fólkaflokkurin ynskir ikki at fara í samstarv við Miðflokkin.

Løgmaður sigur, at hann skilti tíðindini leygardagin sum um, at Fólkaflokkurin ikki er áhugaður at fara í samstarv við Miðflokkin og skipa eina smæla samgongu við 17 tingmonnum. – Mær vitandi hevur Fólkaflokkurin einki sagt um tað. Hvat Sjálvstýrisflokkurin heldur og vil er ein søk sum Sjálvstýrisflokkurin suverent ger av sjálvur. Tað er ikki nakað, sum Fólkaflokkurin leggur seg út í sigur løgmaður, sum framvegis ikki vil útiloka nakran møguleika, hóast hann hevur sínar metingar um, hvat tað besta vildi verið fyri eina stabila gongd.

Um avtaluna millum Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin sigur løgmaður, at teir hava gjørt av at fylgjast tvs. har annar fer, har fer eisini hin og øvugt. Men politiskar støðutakanir og meiningar eru ikki forpliktandi fyri hvønn annan uppá nakran máta. – Sjálvstýrisflokkurin hevur sín profil og umsitur hann fult og heilt. Og vit hava okkara.

Løgmaður váttar, at tað fyriliggur eingin skrivlig avtala við flokkarnar. – Men eg havi so tikið teir við allan vegin og rokni við, at teir gera tað sama. Eitt orð er eitt orð og ein maður ein maður. Tað er tað einasta, sum liggur í avtaluni millum Fólkaflokkin og Sjálv-stýrisflokkin sigur Anfinn Kallsberg, sum vónar, at avtalan røkkur heilt á mál.

# Løgmaður hoyrdi meiningarnar hjá síni floksleiðslu

**Fundur var í gjár í Fólkaflokkinum, har oddafólk kring landið tosaðu um støðuna**

SAMGONGA
*Jan Müller*

Leiðslan í Fólkaflokkinum viðgjørdi á fundi í gjár torføru parlamentarisku støðuna, sum hevur tikið seg upp eftir løgtingsvalið. Bíðað hevur verið við fundinum til formaðurin í landsfelagið Steintór Jacobsen kom aftur úr útlandinum. Ætlanin var annars at halda fundin fyri Hvítusunnu.

Undan fundinum segði løgmaður, at hann skuldi verða ein breið politiskt orientering. Á fundinum vórðu tingmenn, landsstýrismenn, formenn fyri lokalfeløgini kring landið og síðani landstjórnin, sum telur eitt umboð fyri hvørt valdømi.

Slíkur fundur er vanligur eftir eitt val, men støðan samfelagið er komið út í eftir valið, hevur kanska gjørt júst henda fundin rættiliga áhugverdan og kanska eisini avgerandi fyri, hvat nú fer at henda.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum hevur hildið Hvítusunnuna á Viðareiði, segði í gjár, at hann ætlaði sær ikki at taka nakra avgerð um samgongu fyrr enn eftir fundin. Løgmaður vil fegin hoyra meiningarnar hjá floksleiðsluni og ætlaði hann sær at lurta væl á fundinum týsdagin.

Uppá fyrispurning um løgmaður væntaði, at niðurstøðan frá tí fundinum fer at vera avgerandi fyri, hvørjar flokkar hann nú fer at tosa við um skipan av samgongu sigur Anfinnur Kallsberg, at hann sjálvandi fer at lurta væl og heldur hann fundin verða eitt gott høvi til tess.



*Oddafólkini í Fólkaflokkinum eru á fundi at viðgera fløktu parlamentarisku støðuna, ið hevur tikið seg upp eftir løgtingsvalið*

*Myndir Jens K Vang*